TILTØK

Gudstænastur
Mikudagin 30. nov.
Vestmanna kirkja: kl. 16.00, Eldragudstænasta, Inga Poulsen Dam

Gudstænastur
2. sunnudag í advent
Havnar kirkja: kl. 11.00, Bjarni Bæk,
kl. 14.00 Jónsvein Bech, deyvagudstænasta
Vesturkirkjan: kl. 11.00 Heri Joensen
Sandavágur: kl. 12.00, David Johannesen
Norðskála: kl. 11.40, skriftamál, kl. 12.00 Messa, Emil Olsen
Eiði: kl. 17.00 Ljósgudstænasta, Emil Olsen
Haldarsvík: kl. 12.00, Marjun Bæk
Kollafjørður: kl. 12.00 Lestur, Kristiliga sangkórið syngur
Hósvík: kl. 12.00, altarg., Mogens tilsted Christensen
Fríðrikskirkjan: kl. 11.00 Martin R. Jacobsen. ***Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri sjómanskirkjuna***
Vágur: kl. 11.00, altarg.,
Hov: kl. 13.00 altarg., Patrick de Neergaard

Landsbókasavnið
Týskvøldið kl. 20.00 »Ein tíma við bíbliuni«. Terje Gravningen og Erik Lund.

Lívdin í Hoyvíkar skúla
Týskvøldið kl. 20.00 Møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Týsdagin, kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Bøn.
Mikudagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Bøn, kl. 19.00 Delli.
Hósdagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 19.00 Chil.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómurin hittist hjá Tom Rasmussen.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Jerry O'Campo, kl. 11.50 Sunnudagsskúlin.
www.filadelfia.fo

KFUM og KFUK í Havn
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur, nýggir sangarar eru vælkomnir við.
Týsdagin kl. 20.00 í KFUK: DaSnakk. Fyri ung.

Evangeliihúsið, Tróndargøta
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
www.gospel.fo

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Hebron, Argir
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarfundur. Páll Poulsen talar.
Evnið: Rættvísgering.
www.hebron.fo

Ebenezer
Týsdagin kl. 17.00 Frítíðararbeiði, kl. 19.00 Sangvenjing, Ungdómskórið, kl. 20.00 Sangvenjing, Ebenezerkórið.
Mikudag kl. 16.45 Sangvenjing, Yngra barnakórið.
kl. 17.30 Sangvenjing, eldra barnakórið, kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti, Jóan Magnus Rasmussen tosar.
Fríggjadag kl. 20.00 Teen-Night úti á Fløtum.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.
www.ebenezer.fo

Evangeliihúsið, Tróndargøta
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 16.00 Eldrahugni.
Fríggjadagin kl. 18.30 hevur MiniSalt jólahugna.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti við Lív Jacobsen. www.gospel.fo

Saron, Vestmanna
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti í Saron.
Mikukvøldið kl. 20.00 Ungdómsarbeiði.
Hóskvøldið kl. 19.00 Barnaarbeiði.
Sunnudagin 4. des. kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting.

Sandavágur
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Meinigheitshúsinum hóskvøldið 1. des. kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Filadelfia Vágar,
Miðvágur
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla.

Missiónshúsið Libanon
Barnakórið venur mikudagin kl. 17.00.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið kl. 20.00, Tórhild Bjarkhamar verður við og greiðir frá arbeiðinum »Børn í vanda«. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Keldan, Skálafirði
Mikukvøldið kl. 20.00 Møti við Jerry Ocampo frá Filipinunum. Øll eru vælkomin.
Leygardagin kl. 21.00 Awake við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Alex Ocampo. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Siloa, Fuglafjørður
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30, Klæmint Eliasen talar. Evni: At styrkja hin móða við orði Harrans (Esaias kap. 50). Øll eru hjartaliga vælkomin.

Lívsins Orð, Saltangará
Mána-, miku- og fríggjamorgun kl. 6.00-7.00 Bøn.

Aglow, Eysturoy
Jólamøti verður fríggjakvøldið 2. des. kl. 20.00 í Bygdarhúsinum á Strondum. Kvinnur og menn hjartaliga vælkomin.

50 ár
Tann 7. desember verður Jógvan Nybo, Viðareiði, 50 ár. Dagurin verður hildin við vælkomst fríggjadagin tann 2. desember kl. 19.30 á Viðareiði. Vinarliga sigið frá á tlf. 451093/222450 áðrenn 1. desember.

80 ár
Mánadagin 12. desember verður Bjarni Samuelsen, Tvøroyri, 80 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Øravík sunnudagin 11. des. kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Bjarna við at koma í føðingardag vera biðin um at siga frá á tlf. 371319 innan mánadagin 5. desember.

Gullbrúdleyp
Leygardagin 3. desember hava Karin og Jacob Norðberg, Hvalba, gullbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða okkum, eru vælkomin inn á gólvið frá kl. 13.00-17.00 í heiminum hjá Anna-Britt og Martin Eið í Hvalba.

Silvurbrúdleyp
Mánadagin 5. desember hava hjúnini Katrin og Jógvan Karl Joensen í Klaksvík silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima, Undir Klakki 30 frá kl. 17.00 har øll eru hjartaliga vælkomin.

Týsdagin 6. desember hava hjúnini Elvira og Edvin Joensen á Eiði silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í heiminum frá kl. 19.00.

Leygardagin 10. desember kunnu hjúnini Malan og Kristian Hansen í Nólsoy halda silvurbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 327112 ella 580273 áðrenn 1. desember. Byrjað verður á Flakavirkinum við døgurða kl. 19.30.

Týsdagin 10. januar hava Anita og Tummas Pauli Olsen, Syðrugøta, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 7. januar kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í silvurbrúdleyp verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 441795, 213912 í seinasta lagi 14. desember.

Brúdleyp

Leygardagin 10. desember kl. 14.00 giftast í Kelduni í Skálavík, Dávid í Lág, Strendur og Theresa Sevdal, Runavík. Eftir vígsluna verður reseptión í Kelduni, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 10. desember kl. 14.00 giftast í Saron á Viðareiði Óluva Fuglø, Norðdepil og Markus Hvannastein, Viðareiði. Opið hús verður í Norðdepli hjá foreldrunum kl. 20.00, har øll eru hjartaliga vælkomin at heilsa uppá brúðarparið.

Leygardagin 17. desember kl. 12.00 giftast í Nes kirkju Dorith Æðustein Poulsen, Havn og Niclas Allan Danielsen, Toftir, eru búsitandi í Rituvík. Veitslan verður hildin á Svangaskarði kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 449074 ella 749074 áðrenn 8. desember.

Leygardagin 17. desember kl. 13.00 giftast í Adventistakirkjuni Frida Sigmundsdóttir og Eddie H. Joensen, Kollafjørður. Opið hús verður í Bygdarhúsinum í Kollafirði frá kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 421025, 506668 ella 580461 innan 3. desember.

Fríggjadagin 30. desember kl. 18.00 giftast í Miðvágs kirkju Rannvá Ólavsdóttir, Miðvágur og Suni Hansen úr Fuglafirði. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.30. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, verða biðin um at siga frá áðrenn 19. desember á tlf. 333349, tlf. 221428 og tlf. 444208.

Leygardagin 7. januar kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni, Martha Simonsen og Eyðfinn Sigurstein, Tórshavn. Vælkomst verður í Pálsstovu kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá innan 25. desember á tlf. 313830, Martha 216680, Eyðfinn 216600 ella mail á esg@post.olivant.fo

Havnar Bio
kall Coca-Cola



Pedderson & Findus 3 - Nissemaskinen

Týsdag	29.11	kl. 16.30	kl. 18.30
Mikudag	30.11	kl. 16.30	kl. 18.30
Hósdag	01.12	kl. 16.30	kl. 18.30

Harry Potter og flammernes pokal

Týsdag	29.11	kl. 16.00	kl. 19.15
Mikudag	30.11	kl. 16.00	kl. 19.15
Hósdag	01.12	kl. 16.00	kl. 19.15

The Longest Yard

Týsdag	29.11	kl. 20.15	kl. 22.30
Mikudag	30.11	kl. 20.15	kl. 22.30
Hósdag	01.12	kl. 20.15	kl. 22.30



A History of Violence

Týsdag	29.11	kl. 22.45	
Mikudag	30.11	kl. 22.45	
Hósdag	01.12	kl. 22.45	*Seinasta sýning*

KOMANDI FILMUR:

I dine sko — *FRUMSÝNING*

Fríggjadag 02.12

www.bio.fo • Telefon 31 19 56